Ítróttar
Sosialurin
Nr. 67 • týsdagur • 4. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ivi er um spæliloyvið hjá Sylla

**Ahmed Davy Sylla hevur spæliloyvi frá Fótbóltssambandinum, men B36 álopsspælarin hevur sambært Landsfólkayvirlitinum ikki fastan bústað í Føroyum, og tað er neyðugt fyri at fáa spæliloyvi frá FSF. Kappingarnevndin hjá FSF fer at umrøða málið í dag**

B36 IVAMÁL
*Eyðun Klakstein/
Terji Nielsen*

Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum fer á fundi í dag at umrøða eitt mál um B36-spælaran Ahmed Davy Sylla.

Sylla, sum er ættaður av Fílabeinsstrondini, er framúr góður fótbóltsspælari, og í fjør var hann profilur á liðnum hjá ÍF. Í vetur hevur hann gjørt avtalu við B36 um, at hann skal spæla fyri teir í ár.

Sunnudagin var B36 á Skála, og tá eydnaðist at fáa fulla úrtøku. B36 vann 1-0. Ahmed Davy Sylla vísti longu í hesum fyrsta landskappingardysti sítt virði fyri B36, tí hann skoraði einasta málið í dystinum og tryggjaði harvið føroyameistarunum trý stig.

Spurningurin er nú, um øll viðurskifti hjá Sylla eru í lagi fyri at spæla fótbólt í Føroyum. B36 sigur, at øll viðurskifti eru komin upp á pláss, men Landsfólkayvirlitið váttar, at Sylla hevur ikki fastan bústað í Føroyum, og tað er ein fortreyt fyri at fáa spæliloyvi frá Fótbóltssambandinum.

### Greiðar treytir til útlendskar spælarar

Tá ið ein útlendskur spælari skal til føroyskt felag at spæla, skal hann hava spæliloyvi frá FSF. Fyri at hetta loyvisbræv kann útskrivast, krevur FSF eina váttan frá Landsfólkayvirlitinum um, at tann útlendski spælari hevur fastan bústað í Føroyum.

Fyri at fáa fastan bústað í Føroyum skal ein útlendingur hava uppihalds- og arbeiðsloyvi frá fútanum. Søkt verður um hetta loyvi hjá fútanum, sum síðani sendir málið víðari til Innlendismálaráðið. Haðani verður málið sent til danska Udlændingestyrelsen, sum viðger málið, sendir tað aftur til Innlendismálaráðið, sum síðani avgreiðir málið til fútan.

Tá ið øll viðurskifti millum persónin og myndugleikarnar eru í lagi, skrásetir Landsfólkayvirlitið persónin sum búgvandi í Føroyum, og tástani kann FSF eisini skráseta hann í einum føroyskum felag.

Sambært Landsfólkayvirlitinum er Ahmed Davy Sylla ikki skrásettur sum búgvandi í Føroyum.

Hann hevur áður verið búsitandi í Fuglafirði, men uppihalds- og arbeiðsloyvið hjá honum fór úr gildi 30. november í fjør, og síðani hevur Sylla formliga búð uttanlands.

Fyrrapartin í dag váttaði Landsfólkayvirlitið, at Ahmed Davy Sylla, sum er føddur 4. oktober 1982, er búsitandi uttanlands. Landsfólkayvirlitið kann ikki upplýsa, nær Sylla flutti av landinum, ella hvar hann nú býr.

### FSF tekur málið upp

Støðan er tí tann, at Sylla í løtuni ikki lýkur treytirnar fyri at fáa spæliloyvi frá FSF, men tað spæliloyvið, sum hann fekk, tá ið hann av fyrstan tíð flutti til Føroya, er framvegis galdandi, hóast fortreytirnar fyri slíkum loyvi eru burtur.

FSF hevur tann politikkin, at teir kanna ikki viðurskiftini hjá útlendskum spælarum, eftir at teir hava fingið spæliloyvi av fyrstan tíð, men roknað hann sum skrásettan spælara hjá sær til annað verður fráboðað. Tá ið ein slíkur spælir skiftir millum tvey føroysk feløg, verður ikk biðið um nýggja váttan fyri føstum bústaði í Føroyum.

Tí hevði Sylla spæliloyvið frá FSF, tá ið B36 spældi ímóti Skála sunnudagin, hóast hann ikki lýkur treytirnar, sum FSF setir fyri at útskriva spæliloyvi.

– Eg kann bara siga, at í høvuðsheitinum er spæliloyvið hjá Sylla í lagi, tí tað liggur í B36. Uppihaldsloyvi og arbeiðsloyvi hava vit einki við at gera, men kappingarnevndin hevur fund í dag, og tá kemur málið ivaleyst upp at venda, sigur Høgni í Stórustovu, nýggjur formaður í Kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum.

Spurningurin, sum Kappingarnevndin nú skal taka støðu til, er, um nakað skal viðgera hesa óvanligu støðu, og um hon skal fáa nakrar ítróttarligar fylgjur. Spæliloyvið hjá Sylla liggur í B36, men formligu viðurskiftini, sum eru grundarlagið undir spæliloyvinum, eru ikki í lagi.



*Spæliloyvið hjá Sylla liggur í B36, men formligu viðurskiftini, sum eru grundarlagið undir spæliloyvinum, eru ikki í lagi. Kappingarnevndin fer at umrøða málið í dag*

## B36 sigur at alt er í lagi

B36 sigur seg ikki verða vitandi um, at nakað skal verða galið við loyvunum hjá Ahmed Davy Sylla at spæla fótbólt í Føroyum.

– Vit hava koyrt Sylla ígjøgnum vanligu mylluna hjá myndugleikunum, og vit hava fingið øll pappírini aftur. Okkum vitandi er hann eisini skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum, sigur Kristian á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn, sum B36 eisini kallar seg.

*Landsfólkayvirlitið sigur í dag, at Sylla býr uttanlands og ikki er skrásettur í Føroyum?*

– Tað kenna vit einki til. Okkum vitandi eru øll loyvi hjá Sylla í lagi, og um hann ikki er skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum, má tað vera eitt mistak av onkrum slagi. Okkara viðurskifti við uppihalds- og arbeiðsloyvum eru øll í lagi, vit vita ikki um nakað annað.

## Fleiri bíða eftir loyvum

Meðan Ahmed Davy Sylla sunnudagin spældi fyri B36 ímóti Skála, vóru aðrir spælarar í líknandi støðu sum hann, ið ikki spældu fyri feløgini, teir væntandi skulu umboða í ár

Argentinski spælarin Gunnar Nielsen kom saman við Sylla til Føroya fyri tveimum árum síðani, og hann skal spæla fyri GÍ í ár, men nýggja arbeiðs- og uppihaldsloyvið hjá honum er ikki komið upp á pláss enn, og tí valdi GÍ ikki at brúka hann sunnudagin.

Støðan er tann sama við øðrum spælarum. GÍ hevur havt ein útlendskan málverja uttan fyri, tí loyvini ikki vóru í lagi, og EB/Streymur hevur eisini bíðað við einum álopsspælara. Hesi loyvi komu upp á pláss undan vikuskiftinum.

B68 bíðar eftir loyvi til ein hollendskan spælara, KÍ skal hava loyvi til ein serbiskan spælara, og HB skal væntandi hava loyvi til ein nýggjan serbiskan spælara.

### HB og Skála mistu

Skála misti í vetur miðvallarspælaran Nenad Stankovic, tí hann fekk ikki sítt uppihalds- og arbeiðsloyvi longt, og tað sama er við Milan Kuljic, sum skuldi spæla fyri HB, hann fær heldur ikki sítt arbeiðs- og uppihaldsloyvið longt. HB og Skála mugu tí klára seg uttan hesar profilar í ár, hóast teir í grundini hava standandi spæliloyvi frá FSF.

FSF hevur havt tann politikkin, at teir kanna ikki viðurskiftini hjá einum útlendskum spælara, eftir at hann av fyrstan tíð hevur fingið spæliloyvi frá teimum.

Einki mál um ein útlendskan spælara, sum hevur spæliloyvi í einum føroyskum felag, men hevur mist fortreytirnar fyri hesum spæliloyvi, er áður roynt í Dómsnevndini hjá FSF.